# Rak á lastalúku í 14 tímar

**MINNISSTEINUR** Fyrstu stigini til ein minnisstein í Søltuvík vórðu tikin fyri níggju árum síðani. Nú er minnissteinurin yvir teir, sum fóru við 3000 tons stóra enska farmaskipið, Principiu fyri 115 árum síðani vorðin til veruleika. – Tað vóru mans úr fleiri ymiskum londum umborð á skipinum. Tí kann hetta gerast ein dýrgripur fyri útlendingarnar, um altso nøvnini á teimum, sum fórust koma á minnissteinin, sigur ferðaleiðarin, Sámal Bláhamar



**HÁTÍÐARHALD**

*Nógv fólk var samankomið sunnudagin 22. august, tá minnissteinurin yvir teir, sum fórust við Principiu varð avdúkaður í Søltuvík*

Mynd: sandportal.fo




**MINNISSTEINUR**

*Vakri minnissteinurin stendur sum eitt minni yvir eina hending sum fór fram fyri 115 árum síðani. Kann vera, at hesin fer at verða ferðavinnuni at gagni*

Mynd: sandportal.fo

Snorri Brend

**Søltuvík:** Upp gjøgnum øldirnar eru nógv skip sokkin við Føroyar.

Tað serstaka við Principia úr Newcastle er, at hetta er største skip sum er sokkið her á landi.

Skipið var 96 metrar langt, 11 metrar breitt og 2749 bruttotons til støddar, og legði 16. november í 1895 frá landi í skotska býnum Dundee við farmi til New York. Í lastini vóru klútar, pappír og tjørutunnur til USA.

Sambært upplýsingum á alnetinum vóru 28 sjómenn, harav teir flestu vóru úr Bretlandi og eitt ferðafólk, umborð á skipinum sum kom í illveður og fór heilt út av kós.

Tað gekk hvørki verri ella betri enn so, at tað rendi á land við Stóraboða uttanfyri Søltuvík fimm dagar seinni, 21. november 1895. Eldur kom í skipið, sum sakk so at siga beinanvegin.

Bert tann ein maðurin, matrósurin Heinrich Anders úr týska býnum Rostock varð bjargaður. Hann slapp upp á lastalúkuna, og á henni rak hann norður um Trøllhøvda, inn í Hestfjørð og yvir ímóti Gomlurætt, har hann varð sæddur av einum manni á landi.

Eftir at hava rikið í samfullar 14 tímar í illveðri, varð hann at enda bjargaður í land og kom í húsið hjá Jóanesi Patursson í Kirkjubø.

Hann fór aftur til heimland sítt nakrar dagar seinni, men vitjaði aftur í Kirkjubø í 1936. Ein partur av lastarlúkuni er enn til, og verður í dag brúkt sum borð í Stokkastovuni í Kirkjubø.

### Akkerini

Í 2001, 106 ár eftir vanlukkuna, vórðu fyrstu stigini tikin til at fáa akkerini av Principiu upp av havsins botni.

Hetta varð gjørt í góðum samstarvi millum kavarar frá Froskmannafelagnum og Sands Kommunu. Aftaná sjálva landkomuna, varð arbeitt við at viðgera akkerini á rættan hátt, soleiðis at tey ikki saltsprongdust. Tí lógu tey í feskvatni í drúgva tíð.

Í 2008 vórðu akkerini koyrd vestur til Søltuvíkar, eins og minnissteinurin varð bílagdur frá Grótvirkinum í Skopun.

Sitandi kommunustýri, sum avdúkaði steinin sunnudagin 22. august í ár, er tað triðja í røðini, sum arbeiðir við ætlanini um akker og minnistein yvir Principiu.

snorri@sosialurin.fo

## Molin liðugur

**Skúvoy:** Arbeitt hevur verið við at umvæla molan, sum hevur fingið stóran brimskaða.

Hóast tarnað av nógvum brimi og vánaligum veðri, hildu bæði tíðarætlan og kostnaðarætlan, sum var upp á umleið 1 mió krónur.

Arbeiðið varð avhendað 20. juli, hóast ikki alt var heilt liðugt tá.

Annars kann nevnast, at landsverk eisini ger ábøtur á vegakerv og havnarløg í Fugloy, Svínoy, Kallsoy, Mykinesi og í Skúvoy. Í Stóru Dímun er stuðul latin til liðugtgerð av einum sláturhúsi.

snorri@sosialurin.fo

# 285.000 krónur meiri

**SKATTUR** Fyrstu 6 mánaðirnir í ár hava víst, at inntøkumetingarnar hjá Sands kommunu fyri árið koma at halda, um gongdin seinna hálvár verður tann sama sum fyrra hálvár

Snorri Brend

**Sandur:** 6,5 mió krónur.

Tað var inntøkan sum kommunan fekk fyrra hálvár í ár. Tey høvdu annars væntað at fáa 6,36 mió krónur inn í skatti.

– Hetta eru umleið 285.000 krónur minni, enn fyri sama tíðarskeið undanfarna ár, verður sagt úr Sands kommunu.

Juli og august mánaður í ár benda kortini á, at úrslitið fyri árið verður nakað betri enn kommunan metti. Annars gongur afturá við fólkatalinum heima á Sandi. Fyri einum ári síðani búðu 573 fólk her, men í summar var talið komið niður á 549.

snorri@sosialurin.fo